# Handverkarar sera illa nøgdir við Skála- avtalu

**Formaðurin í Føroya Handverkarafelag heldur, at tað er ein ómetaliga farligur sportur at lata pólskar sveisarar koma inn á Skála at sveisa fyri undirløn**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ein sera hættislig gongd

Pól Øregaard, formaður í Føroya Handverkarafelag, er alt annað enn fegin um avtaluna, sum nú er gjørd um, at pólskir sveisar skulu inn á Skála at sveisa – fyri pólska løn.

Nú Thor í Hósvík skal byggja nýtt skip á Skála, hava starvsfelagið hansara í Landsfelagið Handverkaranna annars góðtikið, at póllendingar koma til Føroyar at sveisa skrokkin fyri løn, sum er galdandi í Póllandi og sum sostatt er nógv løgri enn føroysk løn.



*– Tað er langt úti at gera eina avtalu um at lata póllendingar koma til Føroya ar sveisa fyri undirløn, heldur formaðurin í Føroya Handverkarafelag. Hann er sostatt fullkomiliga ósamdur við hitt handverkarafelagið*

Hetta hevur verið nevnt eitt nýbrot á føroyska arbeiðsmarknaðinum og sagt hevur verið, at hetta er eindømi í Norðurevropa.

Sagt hevur eisini verið, at tað er útdeytt handverk í Føroyum at sveisa skipsskrokk og tí taka póllendingarnir ikki arbeiði frá føroyingum. Ført er eisini fram, at hendan loysnin er einasti máti at gera alt skipið í Føroyum.

### Langt úti

Pól Øregaard er alt annað enn samdur í, at hetta er eitt nýbrot.

– At hetta er eindømi í Norðurevropa, sigur alt um hesa avtaluna, heldur hann.

Men hann leggur dent á, at hann tosar bara fyri seg sjalvan.

Hann heldur nevniliga, at tað er langt úti at gera eina slíka avtalu og at hetta er ikki tað, sum hann ætlar við fakfelagsarbeiði.

– Fara vit undir slíkt virksemi sum hetta, kann tað vera so skjótt, at rættiligt glið kemur á og so kann føroyskt handverk standa á síðulinjuni, áðrenn vit vita av, og hyggja at, ímeðan undirløntir útlendingar gera alt arbeiði fyri okkum.

– Hesuferð er tað skrokkurin. Spurningurin er um ikki glið kemur á og tí kann hetta so skjótt breiða seg til onnur øki eisini. Tí kann hetta enda við, at vit veða skúgvaðir á síðulinjuna, meðan útlendingar gera alt arbeiði fyri okkum.

Hann sigur, at fakfeløgini hava altíð stríðst fyri at útvega limunum so góð kor sum gjørligt, men hetta er við at máa grundarlagið undan okkara arbeiði.

– Hetta vísir bara, at Landsfelag Handverkaranna er farið í part við arbeiðsgevarunum, tí hetta er rættiligt undirgravingarvirksemi.

### Hava dugað- og duga enn

Pól Øregaard trýr onki upp á, at ein orsøk skal vera, at tað er útdeytt handverk at sveisa skipsskrokkar í Føroyum.

– Tað hava vit gjørt fyrr. Tað gekk gingið væl og tað duga vit helst enn. Hetta er líka langt úti sum restin sigur hann.

– Hetta er eina og aleina gjørt fyri at arbeiðsgevarin skal sleppa bíligari.

Hann vísir eisini á, at avtalan um póllendingarnar er gjørd uttan at Føroya Handverkarafelag er visti av tí.

Hann heldur, at eitt er, at skrokkar verða sveisaðir í Póllandi og sleipaðir til Føroya.

Tað er sínar sakir. Men tað er eitt heilt annað er, at póllendingar nú koma inn á okkara øki at arbeiða fyri undirløn.

– Og tað er ógvuliga vandamikil gongd, heldur formaðurin í Føroya Handverkarafelag.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá formanninum í Landsfelagið Handverkaranna, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Smyril skal nú hava skeinkiloyvi

**Strandferðslan vil lyfta tænastustøðið á Smyrli upp á eitt hægri støði og menna ferðavinnuna í Suðuroy**

SKEINKILOYVI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal tað bera til hjá ferðafólki við Smyrli at fáa eitt glas av víni, ella eina øl, afturvið matinum.

Tað heldur Strandferðslan.

Strandferðslan hevur sostatt søkt loyvisnevndina um at fáa eitt hálvt skeinkiloyvi til Smyril.

Og Anna Dam, forkvinna í loyvisnendini, váttar, at nevndin nú hevur givið Strandferðsluni tilsøgn um eitt hálvt skeinkiloyvi.

Loyvisnevndin hevur verið umborð á Smyrli og kannað viðurskiftini og niðurstøðan er, at flaggskipið hjá Strandferðsluni hevur fingið tilsøgn um eitt hálvt skeinkiloyvi.

Forkvinnan í loyvisnevndini sigur, at endaligt skeinkiloyvi kann skrivast, tá ið ymisk formlig viðurskifti eru fingin í rættlag.




*Strandferðslan brýtur upp úr nýggjum tí nú skal tað bera til hjá ferðafólki við Smyrli at fáa eitt glas av víni, ella eina øl, afturvið mati. Nú á døgum er tað ein natúrligur partur av eini málttíð at fáa eina øl ella eitt glas av víni afturvið, sigur Heini á Borg á Strandferðsluni*

Eitt nú skal tilskilast, hvør skal hava ábyrgdina av skeinkiloyvinum og yvirhøvur eru tað ikki nógv viðurskifti, sum skulu fáast í rættlag.

Anna Dam sigur, at skeinkiloyvið til Smyril verður ikki galdandi fyri alt skipið.

– Skeinkiloyvið verður bara latið til tær báðar matstovurnar á sætta dekki, sigur forkvinnan í loyvisnevndini.

### Lyfta tænastustøðið

Heini á Borg á Strandferðsluni, sigur, at endamálið við hesum tiltakinum er at lyfta tænastustøðið á Smyrli upp á eitt hægri støði.

Men Strandferðslan ásannar, at hjá nógvum fólki er øl og vín blivin ein natúrligur partur av eini máltíð.

Hann sigur eisini, at ætlanin er fara ómetaliga hóvliga til verka umborð á Smyrli.

– Smyril verður ikki eitt flótandi vertshús, staðfestir hann.

– Tí er ætlanin bara at skeinkja pilsnarøl, hóast Smyril eisini fær loyvi at skeinkja øll við gull styrki. Samstundis er ætlanin at hava eini trý sløg av reyðvíni og eini trý sløg av hvítvíni í smáum fløskum til sølu í kafeteria.

Og tað verður bara selt afturvið mati.

Í tí fínaru matstovuni er so ætlanin at hava nøkur fleiri sløg av víni.

Í hesum liggur eisini, at ætlanin er at tann fínara matstovan skal vera meiri opin enn hon er.

– Tað skal eisini vera við til at lyfta tænastustøðið á Smyrli upp, at vit kunnu bjóða ferðafólki eina góða málttíð í tí betri matstovuni við víni ella øli afturvið, sigur Heini á Borg.

Í hesum sambandi hevur Strandferðslan eisini søkt eftir tænastuleiðara til Smyril. Umsóknarfreistin er farin og 11 umsøkjarar vóru og í næstum verður starvið sett.

Heini á Borg væntar, at tað verður einaferð í heyst, at tað fer at bera til at fáa sær eina øl ella eitt glas av víni afturvið matinum á Smyrli.

Hann heldur ikki, at Strandferðslan, sum almennur stovnur, við hesum leggur seg út í kapping við privatu vinnuna.

– Tvørturímóti halda vit, at hetta kundi stuðla uppundir privatu ferðavinnuna í Suðuroy. Hetta er ein roynd at økja um ferðafólkatalið á Suðuroyarleiðini so at fleiri ferðafólk fara til Suðuroy og brúka teir møguleikarnar, sum har eru.

– Sostatt meta vit, at hetta tvørturímóti kann vera við til at menna ferðavinnuna í Suðuroy, sigur Heini á Borg.